Løgmaður:

# Høgni hevur miskilt málið

**Høgni Hoydal sigur, at landsstýrið hevur framt brot stýrisskipanarlógina, tí tað hevur viðtikið danskar lógir rundan um løgtingið. Høgni Hoydal hevur misskilt málið, her er eingin nýggj lóg, sigur løgmaður**

MARJUN DALSGAARD
*Christiansborg*



*Jóannes Eidesgaard løgmaður sigur, at Høgni Hoydal hevur miskilt samanhangin, og at tað als ikki er talan um nakað brot á stýrisskipanarlógina, eins og hetta ikki kann samanberast við hendingina í vár, tá danska stjórnin setti hernaðarligar lógir í gildi í Føroyum, rundanum føroysku politikkararnar*

Høgni Hoydal setti mikudagin Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharra fyrispurning um, hvat hann ætlar at gera við brot á fólkarædi í Føroyum, tí danskar lógir verða lýstar í Føroyum, sum ikki eru viðgjørdar í løgtinginum. Forsætisráðharrin svaraði, at hann als ikki hevur nakran áhuga í at leggja seg út í, hvat landsstýri leggur til viðgerð í løgtinginum, og at kunngerðirnar vóru lýstar í semju við Føroya Landsstýri.

Hetta fær Høgna at kalla kunngerðirnar fyri brot á stýrisskipanina.

– Tað er skelkandi at málini ikki eru komin fyri løgtingið, sigur hann. Sambært stýrisskipanarlógini er álagt løgmanni og landsstýrinum at leggja allar lógir fyri løgtinginum, og hetta er eitt klárt brot á tað reglu, sigur hann. Hann er bangin fyri, at framyvir fer løgtingið ikki at kunna fylgja við í hvørjar lógir vera samtyktar at galda í Føroyum, og man aldrin kann vita, hvat er í væntu, tá Kunngerðarblaðið kemur við postinum.

– Um okkara landsstýri so gjarna vil tekkjast donsku stjórnini, at teir bara lata alt fara í gjøgnum uttan at spyrja løgtingi fyrst, missa føroyingar alla ávirkan á, hvat er galdandi í Færoyum, sigur hann.

Talan er um tvær kunngerðir frá 26. november 2004, sum standa í Kunngerðarblaðnum B nr. 13 og 14. Onnur er ein kunngerð um NATO-sáttmálan, sum snýr seg um innliman av Týsklandi í 1954 og seinni teimum baltisku londunum. Hin ein kunngerð um altjóða dómstólin fyri krígsbrotsverk.

### Eingi nýggj lóg

Jóannes Eidesgaard løgmaður sigur, at Høgni Hoydal hevur miskilt samanhangin, og at tað als ikki er talan um nakað brot á stýrisskipanarlógina, eins og hetta ikki kann samanberast við hendingina í vár, tá danska stjórnin setti hernaðarligar lógir í gildi í Føroyum, rundanum føroysku politikkararnar.

– Viðvíkjandi lógini um altjóða dómstólin er talan um eina samanskriving av lógum, sum áður eru viðgjørdar og viðtiknar í løgtinginum. Hetta er ein pedagogisk kunning til borgaran, tí tað er ómøguligt at fylgja við í, hvørjar broytingar gjøgnum tíðina eru gjørdar í galdandi lóg, um hetta ikki verður gjørt, sigur Jóannes Eidesgaard og leggur aftrat:

– Mær vitandi er hetta ein kunngerð, sum fyrrverandi landsstýri, sum, Høgni Hoydal sjálvur var partur av, hevur biðið um. Viðvíkjandi kunngerðina av NATO-sáttmálanum kann ein undrast á, at Høgni Hoydal tekur tað máli upp í Fólkatinginum, tí tá altjóða sáttmálar verða broyttir, verður tað kunngjørt fyri at kunna um broytingarnar, og ikki tí tað skal viðgerðast. Tað er nú einaferð soleiðis, at føroyingar einki at hava at siga, um NATO ger av at broyta sáttmálan - hartil er talan um gamlar broytingar, til dømis tá Týskland á sinni var innlimað í NATO í 50'unum, og tær hava verið galdandi í nógv ár, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann heldur ikki, at nakað brot hevur verið á stýrisskipanarlógina.

– Eg hevði skilt tað betur um hann tók í grein sjey í heimastýrislógini, sum vísir á, at tað er góður siður, at leggja øll mál fram fyri løgtingið, men einki nýtt er í hesum málum, og tí meti eg, at tað hevði tað verið at halda løgtinginum fyri gjøldur, at lagt hesi málini til viðgerð.

## BAKGRUND

Hóast tað ikki er vanlig mannagongd, at danska stjórnin leggur seg út í, hvørjar lógir verða lagdar fyri løgtingið, spurdi Høgni Hoydal kortini mikudagin Anders Fogh Rasmussen, hvat hann ætlaði at gera við tað brot á fólkarættarligu mannagongdirnar, sum eru í Føroyum, í sambandi við at tvær lógir eru lýstar í Kunngerðarblaðnum, sum ikki eru viðgjørdar í løgtinginum. Hann legði donsku stjórnina undir at seta lógir í gildi í Føroyum, uttan at spyrja føroyingar fyrst.
Orsøkin til hetta er, at danska stjórnin í 2003 valdi at seta nakrar hernaðarligar lógir í gildi í Føroyum, hóast eitt samt løgting mótmælti hesum.
Eftir hetta, gjørdi løgtingið av at ótmæla avgerðina hjá donsku stjórnini enn einaferð, men einki broyttist.
Síðan skeyt Norðuratlantsbólkurin upp, at Fólkatingið legði trýst á stjórnina, at seta lógirnar úr gildi og ávaraði samstundis um, at varð hetta ikki gjørt, fóru føroyingar at skilja tað sum, at hetta var ein nýggjur framferðarháttur hjá donsku stjórnini viðvíkjandi Føroyum - at lýsa lógir fyri Føroyar, uttan at spyrja føroyingar fyst.
Høgni Hoydal vildi mikudagin vera við, at júst hetta er hent nú, og hann sipaði til tvær kunngerðir í Kunngerðarblaðnum B frá 26. november.



*Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, biður Høgna Hoydal fara heim til Føroyar at føra hetta orðaskiftið*

# Fogh: Tak hatta stríði í Føroyum

**Høgni Hoydal fekk greið boð um at halda føroysk orðaskifti í Føroyum, tá hann mikudagin setti tveir spurningar til forsætisráðharran**

CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*



*Høgni Hoydal heldur, at landsstýrið hevur framt brot á stýrisskipanarlógina við at viðtaka danskar lógir uttan um løgtingið*

Mikudagin setti Høgni Hoydal danska forsætisráðharranum tveir spurningar í spyrjitímanum í fólkatinginum. Hann fekk í báðum førum at vita, at hann kundi taka orðaskiftið til Føroyar, har tað hoyrir heima, og at tað einki hevur við fólkatingið at gera.

Fyrri spurningurin var í sambandi við nógv umrødda málið, at víðkanin av NATO sáttmálanum og lóg um altjóða krígsdómstólin ikki varð viðgjørd í løgtinginum.

Í hesum førinum, svaraði Anders Fogh Rasmussen, at hann als ikki ætlar sær at leggja seg út í, hvat Føroya Landsstýri sendir í løgtingið til viðgerð, eins og hann undraðist á, at Høgni vildi hava seg at leggja seg út í tað, tí hann vanliga helst sær, at danska stjórnin blandar seg uttan um, hvat hendir í Føroyum.

Høgni Hoydal sigur, at hann spurdi um hetta, av tí at hann óttaðist, at tað vóru danskar lógir, sum vórðu settar í gildi í Føroyum uttan um Føroya Landsstýri - og tí spurdi hann danir.

– Hartil eru tað danir, sum hava gjørt hesa skipan, og áttu tí at gjørt nakað fyri, at hon riggar í sátt við fólkarædiligu prinsippini, sigur Høgni Hoydal.

Næsti spurningur hjá Høgna Hoydal var viðvíkjandi uttanríkismál. Hann vildi vita, um Føroyar og Grønland kunnu gerast sjálvstøðugir limir í Norðurlandaránum og IWC, og aftur var svarið, at kjakið hoyrir heima í Føroyum. Sambært Anders Fogh Rasmussen, veit Høgni Hoydal væl, at hetta ikki ber til, av tí at Føroyar ikki eru eitt sjálvstøðugt land, og hann heldur sostatt ikki, at nøkur orsøk er til at draga spurningin í fólkatingið.

### Danir blokera

Hesum er Høgni Hoydal ikki samdur í - hann heldur, at tað eru danir, sum forða fyri, at føroyingar og grønlendingar fáa sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum.

– Tað er siðvenja í Norðurlandaráðnum, at viðtøkur verða broyttar til frama fyri tey smáu londini - tað eru danir, sum blokera fyri, at Føroyar og Grønland kunnu gerast limir, sigur Høgni.

Hann heldur ikki, at fullmagtin, sum landsstýri nú samráðast við donsku stjórnina um, gevur føroyingum størri ávirkan.

– Tað eg vildi hava forsætisráðharran at vátta var, at vit ikki fáa størri ávirkan við hesi fullmaktini - vit hava longu møguleika fyri at samráðast um fiskivinnuavtalur og so framvegis. Hann váttaði eisini hetta - vit gerast ikki sjálvstøðugir limir í altjóðafelagsskapum, sum Norðurlandaráðnum og Altjóða Hvalakommisiónini, IWC við hjálp av hesari fullmaktini, og tí er einki nýtt í hesum.

Undir hólmgonguni millum løgmann og Høgna Hoydal, segði Jóannes Eidesgaard í hesum sambandi, at fullmaktin er ein veruleikagerð av Tvøroyrarskjalinum, sum Høgni Hoydal kallaði eitt stórt framstig fyri fullveldi, men at landsstýri arbeiðir iannanfyri teir karmar, sum ríkisfelagsskapurin setir.